# Tingmenn vilja vera stjóri

Í Íslandi skal Fiskistovan hava nýggjan stjóra, og tá umsóknarfreistin rann út um vikuskiftið, høvdu tólv søkt starvið. Millum teir tólv umsøkjararnar eru tríggir fyrrverandi altingslimir. Tað eru Arnbjörg Sveinsdóttur, sum er fyrrverandi formaður í tingbólkinum hjá Sjálfstæðisflokkinum, Magnús Stefansson, fyrrverandi tingmaður fyri Framsóknarflokkkin og Sigurjón Þórðarson, fyrverandi altingsmaður fyri Tey Frælslyntu. Uppgávan hjá Fiskistovuni er at halda eyga við, at landsins lógir og reglur innan fiskiveiði og aling verða hildnar.



# Vend í Bretlandi

Bretland er millum tey londini, sum eru serliga meint rakt av altjóða kreppuni, men nú bendir okkurt á, at vend er við at koma í har eisini. Ein nýggj kanning kemur til ta niðurstøðu, at bretski búskapurin fer at veksa 0,5 prosent í hesum ársfjórðinginum. Tað er ein munandi bati samanborið við apríl ársfjórðing, tá búskapurin minkaði 1,0 prosent. Frammanundan hava Japan, Týskland og Frakland boðað frá vøkstri í búskapinum, og tað sama sigur tjóðbankin í USA. Eisini asiatisk lond sum Teiland og Hong Kong siga frá framburði.



Partar av Les 3 bókaheildini hjá Føroya Skúlabókagrunni eru egnaðir heilt fram til víðari lestur

# Næmingar læra um lívsvirði

**Lívsvirði er evnið í nýggjum bókaverki til næmingar í framhaldsdeildini í fólkaskúlanum**

SKÚLI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Triðja bókin í Les røðini til føroyskt í framheildsdeildini er komin. Les 3 er ein bókaheild við tekstasavni, arbeiðsbók og ástøðisbók.

Yvirskipaða temaðið er lívsvirði í einum samfelagsligum høpi. Evnini snúgva seg millum annað um menniskju og náttúru, persónligar og samfelagsligar broytingar, religión, sambandið millum Føroyar og útheimin, føoyskan samleika og føroyskt mál.

Í tekstasavninum verður temaið viðgjørt í stuttsøgum, leikritum, yrkingum, brotum úr skaldsøgum, sálmum, blaðgreinum og ritroyndum

Arbeiðsbókin, sum er býtt í partar samsvarandi temabýtinum í tekstasavninum, lýsir evnini, kunnar um rithøvundarnar og tekstirnar, og gevur hugskot til tekstaviðgerð av einstøku tekstunum.

Ástøðisbókin greiðir frá ymisku tekstasløgunum og lýsir við støði í ítøkiligum dømum, hvussu ymisku tekstasløgini kunnu greinast. Føroysk myndlistasøga og myndagreining verða eisini viðgjørd í ástøðisbókini.

Les 3 er ætlað til føroyskt eftir 9. árgang í fólkaskúlanum. Fyrsti málbólkur eru næmingar í 10. Flokki, men bókin er uttan iva eisini væl egnað til fyrstu árgangirnar á miðnámi. Harumframt er Les Ástøði væl egnað heilt fram til víðari lestur

Lydia Didriksen, lærari og rithøvundur, hevur ritstjórnað tekstasavnið, og Kirsten Brix og Lydia Didriksen hava skrivað arbeiðs- og ástøðisbøkurnar.

Tað er Føroya Skúlabókagrunnur, sum gevur Les røðina út.

# Skoti málar Føroyar

**Føroyska náttúran er myndevnið á framsýning hjá skotanum Owen Henderson, sum letur upp á Galleri Sct Gertrud í Keypmannahavn í vikuskiftinum**

LIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Leygardagin verður høvi at síggja skotska list við føroyskum íblástri, tá skotin Owen Henderson sýnir fram málningar, sum eru úrslit av hansara vitjanum í Føroyum



*Føroyski íblásturin skínur týðiliga ígjøgnum í myndunum hjá skotanum Owen Henderson*

### „Føroyagrønir" málningar

Owen Henderson er føddur í 1971 í skotska býnum Dundee. Hann hevur tikið listarliga útbúgving á Duncan of Jordanstone College of art og er virkin listamaður í Skotlandi.

Nú er hann so í Danmark - har hann málar Føroyar. Hansara áhugi fyri Føroyum byrjaði, tá hann hitti eina danska gentu, sum hevur sambond við Føroyar. Henderson gjørdist hugtikin av føroysku náttúruni, sum hann myndevnisliga kendi heimlandið Skotland aftur í. Hann fór tí til Føroyar at mála, hitta listafólk og fyri at fáa eina kenslu av føroysku sálini.

Úrslitini sýnir hann fram nú í eini røð av málningum, sum vísa hansara fatan av okkara grønu oyggjum

Í skrivi frá gallerínum verður sagt, at tað kennist á myndunum, hvussu intenst Henderson hevur arbeitt við litunum fyri at fáa fram litríkidømið, tá sólstrálurnar lýsa upp tað „føroyagrøna" landslagið ella skiftandi ljósið, tá eitt æl ella illveður umskapa myndina til eina loyndarfulla frásøgn. Her skínur ávirkanin frá skotska hálandinum eisini ígjøgnum.

Framsýningin letur upp leygardagin 29. august klokkan 13, tá høvi eisini verður at hitta listamannin. Framsýningin er opin fram til 12. september.

Gallerí Sct Gertrud skipar vanliga fyri 8 til 10 framsýningum um árið við norðurlendskari landslaglist. Føroysk list hevur ein týðandi leiklut á framsýningunum á Sct Gertrud, men eisini verk hjá íslendskum og donskum listafólkum eru javnan at síggja á framsýningunum.

# Ein millión danir eru teldu analfabetar

**Ein million danir hava ongantíð brúkt eina teldu, meðan enn ein million hava sera vánaligar telduførleikar**

KANNING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Nogvir danir kundu skriva eina www adressu inn á browsararegluna í svøvni. Og so eru tað tey, sum fara í baklás, bara tey hoyra tos um www adressir og ikki hava hylling á, hvat ein browsari er fyri nakað.



*Ein millión danir eru fullkomiliga eiðasørir, tá tað ræður um at duga at brúka teldu og internetið*

### Tey eldru illa fyri

Nýggjasta kanningin, sum Danmarks Statistik hevur gjørt av telduførleikunum hjá dønum vísir, at sera stórur munur er á, hvussu danir klára seg við eina teldu.

Kanningini vísir millum annað at 19 prosent av øllum dønum hava ongantíð brúkt eina teldu 22 prosent brúka telduna lítið og hava vánaligar kt-førleikar 31 prosent hava miðalgóðar kt-førleikar 29 prosent hava góðar kt-førleikar

Tað er sonevnda It-Barometrið hjá Danmarks Statistik, sum á hvørjum ári kannar telduførleikarnar hjá dønum. Í kanningini skulu fólk svara 37 spurningum um, hvussu væl ella illa tey duga at brúka leitiskipanir sum Googe og Yahoo, um tey duga at viðhefta skjøl í teldupostar og hvussu tey annars duga at brúka mest vanligu tekstskipaninar á teldu

Tað eru serliga eldri fólk og tey, við stuttari ella ongari útbúgving, ið eru at finna í bólkinum af fullkomiliga eiðasørum teldubrúkarum.

Ung fólk og tey við langum útbúgvingum klára seg sum heild sera væl í spurnarkanningini.

Kanningin er gjørd fyri danska Vísundamálaráðið, sum nú fer at seta tiltøk í verk, sum skulu bøta um telduførleikarnar hjá dønum.

Enn hava vit onga tílíka kanning gjørt í Føroyum. Og enn finst einki skipað tilboð til eitt nú teir eldru føroyingarnir, sum ikki megna at samskifta og ogna sær vitan umvegis telduna og netið.